# Eta breyð frá Valdemar uttan gebiss!

## Týsdagin í farnu viku kundu sørvingar aftur keypa heimabakað breyð í heimbygdini. Tá fór roynda bakarin, Valdemar Simonsen í Sørvági undir handverk sítt enn einaferð. – At eg gjørdist bakari var av berari tilvild, sigur 60 ára gamli Valdemar



*- Eg brúki rættiligt súrdeiggj. Tað ger at breyðini verða heilt serlig, sigur Valdemar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sørvágur:** Árla á morgni henda týsdagin var Valdemar á fótum. Við váttanini frá Starvsstovuni í einu hondini og deigginum í hinari, var klárt at fara til verka: Bakaríið hjá Valdemari var byrjað aftur.

Fyrstu rugbreyðini, fransbreyðini og omega-breyðini vórðu kvikliga tikin úr ovninum, og við bili send til handlar í Vágum, Vestmanna og í Havn.

Fólk í bygdini høvdu helst havt ein varhuga av, at okkurt var í ger – ella gerð – í handilshølunum mitt í Sørvági. Og stór var frøin, tá tey nú aftur kundu keypa heimabakað breyð í heimbygdini.

– Telefonin hevur ringt rættiliga ofta í morgun. Øll ringja og takka fyri, at bakaríið nú lat upp aftur. Ein eldri kona ringdi fyri løtu síðani og segði, at hon hevði ikki etið ordilig breyð í langsamiliga tíð.

– Hon segði, at hon hevði keypt breyð frá mær og kundi eta tey, uttan at neyðugt var at taka gebissið úr. Tey vóru bæði góð og bleyt, og ikki so hørð og turr sum hini. Nú hevði hon ongar trupulleikar at eta tey, sigur Valdemar og flennir hart.

Eitt skifti vóru trý bakarí í Vágum, men síðani í august hevur einki verið. Nú fáa fólk aftur møguleika at keypa breyð frá Valdemari, fleiri ár eftir at hann bakaði sítt seinasta breyð.

### Sjáldsamur bakari

Mong ár eru liðin, síðani Valdemar sum bakari bakaði sítt fyrsta breyð og sum konditari prýddi fyrstu køkuna. Hann hevur verið í starvi bæði í Sørvági, Sandavági og í Havn.

– Eg ætlaði ikki beinleiðis at skula gerast bakari burturav, greiðir hann frá.

Á vári 1964 var hann púra klárur og sannførdur um at fara til Grønlands at rógva út. Hann fekk tíverri – ella tíbetur – bruna í hálsin, og læknin ráddi honum frá at fara hagar.

Ommubeiggi hansara í Sørvági, vanliga nevndur Skælings-Jógvan var bakari, og í hesum starvi byrjaði so Valdemar. Eitt starv sum millum annað gav honum arbeiði í Køkubúðini hjá Andreas Jacobsen í Havn.

– Eg arbeiddi sum sveinur í bakaríinum hjá Conrad Skaale í Havn, tá Andreas í Køkubúðini kom og spurdi meg, um eg ikki kundi koma at arbeiða sum meistari hjá sær, tí versonurin skuldi fara at arbeiða á Posthúsinum.

– Hetta ljóðaði spennandi, men hinvegin, – skuldi eg fara at arbeiða hjá Andreasi – hesum manninum, ið eg hevði hoyrt so nógv undarligt um?, sigur Valdemar við einum stórum brosi.



*– Eg trúði at mín seinasta løta var komin, tá eg fekk ógvusliga blóðtøppin í 2001, sigur Valdemar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Einki tos um pinsar ella traktatir

Tað gingu nevniliga nógvar søgur um Andreas, sum var virkin í Evangeliihúsinum í Havn og hvat tað vildi siga at vera pinsavinur. Onkur bilti Valdemari inn, at hann mátti ansa eftir pinsunum, tí teir kundu finna uppá so mangt undarligt. Millum annað visti onkur at siga, at teir ofta settu seg í eitt hálvmyrkt horn at prutla.

– Ja, tey søgdu enntá fyri mær, at eg ikki bert slapp at arbeiða sum bakari í Køkubúðini, men mátti eisini út at ganga runt við kristiligum traktatum, sigur Valdemar, meðan hann flennir hart.

– Og tað besta av øllum var, tá tey søgdu, at tá kakurnar skuldu koyrast út, so behøvdist eg slettis ikki at stýra. Tað skuldu Jesus-pápi nokk syrgja fyri!

– So tú kanst ætla, at eg mátti heim at hugsa um hetta: Hvør í víðu verð mundi hesi maðurin í Køkubúðini vera?

Valdemar fór heim at hugsa um hetta, men avgerðin at arbeiða fyri Andreas var løtt at taka: Aftaná var hann bæði væl móttikin og væl løntur av Andreasi og konuni.

– Hann tosaði ongatíð við meg um traktatir, at fáa meg til pinsavin ella niður í karið. Nei tey bæði vóru av allar fittastu fólkum, sigur Valdemar, sum fekk kringluna, sum hekk uttanfyri bakarí'ið, sum gávu tá tað læt aftur.

### Svav á mjølsekkunum

Hóast lønin hjá einum meistara helst kundi rokkið longri, so nýtti Valdemar hana kortini við skili. Hann byrjaði spakuliga at fyrireika seg uppá tað, sum skuldi gerast hansara lívsstarv.

Meðan hann lærdi keypti hann ein miksara, eitt brúkt kar at elta deiggj í frá gamla bakaranum við Skálafjørðin, bakaraovnin úr Bøgøtu í Havn og so líðandi hevði hann keypt sær so mikið av útgerð, at hann hevði møguleika at byrja fyri seg sjálvan í Sørvági.

Hann fekk eini gomul handilshøli mitt í bygdini til leigu, fekk umbygt tey og fór so til verka sum bakari. Men tá vóru ikki mong oyruni eftir.

– Tá eg læt upp, átti eg ikki so frægt sum vekslipening av koyra í kassan. Eg mátti læna teir frá mammu míni, sigur Valdemar við einum brosi.

Hetta við einum bakara í bygdini, dámdi bygdarfólkinum sera væl – ja, vørurnar gingu sum heitt breyð. Og Valdemar var sum í leysari luft.

– Alt var so nýtt og spennandi hjá bygdarfólkinum, og vørurnar vóru seldar eftir fáum tímum. Eg mátti tí mangan gera nýtt deiggj og tendra ovnarnar aftur áðrenn døgurða, fyri at hava nóg mikið av breyði seinnapartin.

- Hetta var ein sera strævin tíð, og tað kom meiri enn so fyri at eg svav á mjølsekkunum!

### Small í gólvið

Tað gekst væl við bakingini, men Valdemar hevði somuleiðis áhuga fyri aðrari vinnu, og setti tí pening í ymsastaðni.

Hann var millum annað størsti eigarin í Vesturvarða, var við tá flakavirkið byrjaði og í ísvirkinum, og stóð